**Vælkomin til dyst í Fløtugerði**




HAVSBRÚN

**Leikskrá nr.1**

ARGJA BÓLTFELAG 1973

sunnudagur 13. mars 2016

effo deildin

Mynd: Magnus Jacobsen

# Dysturin í dag

Birgir Petersen
ábyrgdarblaðstjóri



Vælkomin til Effodyst Fløtugerði, seinast liðini møttust á okkara heimavølli var seinasta summar og spældu vit tá í Sarpugerði, orsaka av at vit fingu lagt nýtt graslíki á okkara vøll tá.

Tá fingu vit hála okkum ein javnleik í evstu løtu. Allir okkara dystir í fjør endaðu javnir, og er hetta ógvuliga sigandi um javna innanhýsis stríðið millum liðini seinastu mongu árini.

Hetta er okkara fyrsti heimadystur í ár, fyrsta umfar vóru vit í Havn og komu í klørnar á hvítu tikarunum og var úrslitið ikki serliga gott fyri okkara viðkomandi, men okkurt kundu vit taka við okkum frá dystinum, tí vit fingu trýst teir aftur á vøllin stóran part av dystinum. Neyvleikin er helst nakað, sum vit skulu fáa uppá pláss, tí tjansir fyri at skora vóru fleiri.

So er at vóna at argja-frensarnir ikki klóra alt for illa í dag...

*Birgir*

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Í 2015 gekk tað soleiðis:** | | | |
| 5 | 02-04-2015 | ÍF-AB | 3-3 |
| 25 | 20-09-2015 | AB-ÍF | 2-2 |
| **Í 2014 gekk tað soleiðis:** | | | |
| 9 | 18-05-2014 | ÍF-AB | 1-4 |
| 18 | 10-08-2014 | AB-ÍF | 2-0 |
| 23 | 21-09-2014 | ÍF-AB | 3-0 |
| **Í 2013 gekk tað soleiðis:** | | | |
| 1 | 09-03-2013 | ÍF-AB | 2-1 |
| 10 | 18-05-2013 | AB-ÍF | 0-1 |
| 21 | 31-08-2013 | ÍF-AB | 3-2 |
| **Í 2010 gekk tað soleiðis:** | | | |
| 6 | 09-05-2010 | AB-ÍF | 0-2 |
| 15 | 03-07-2010 | ÍF-AB | 4-4 |
| 19 | 22-08-2010 | AB-ÍF | 1-4 |
| **Í 2009 gekk tað soleiðis:** | | | |
| 3 | 19-04-2009 | AB-ÍF | 2-0 |
| 12 | 17-06-2009 | ÍF-AB | 3-0 |
| 21 | 23-08-2009 | AB-ÍF | 4-2 |

ÍF
530 Fuglafjørður · Tel 444 636
Fax 444 634 · if@if.fo www.if.fo

LEIKSKRÁIN:
Útgevari: ÍF-fótbóltur
Ábyrgd: ÍF fótbóltur / Birgir Petersen
Uppsetan: Hildur Høghamar

HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Box 81 • 530 Fuglafjørður • tel. 414400 • fax 414401
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo

# Tippikapping

Aftur í ár fara vit at hava eina tippikapping, har tú hevur møguleika fyri at tippa komandi umfar í effo deildini, umframt ein av málskjúttunum pr. dyst. Reglurnar fyri at luttaka eru sera einfaldar: Tú tippar allar dystirnar, umframt at tú skrivar navnið á einum leikara, ið tú væntar megnar at skjóta eitt mál. Skriva síðan navn og telefonnummar á seðilin, og lat hann inn í kioskina í ítróttarhúsinum seinasta lagi 15 minuttir eftir at dysturin í dag er liðugur. Lutakast verður síðan ímillum teir seðlar, ið hava flest rætt svar. Drigið verður fyri hvønn triðja heimadyst, og verður vinnarin uppringdur.

| Heimalið | Útilið | 1 | X | 2 | Málskjútti |
|---|---|---|---|---|---|
| NSÍ | Skála | | | | |
| HB | KÍ | | | | |
| ÍF | VÍKINGUR | | | | |
| TB | AB | | | | |
| B68 | B36 | | | | |

Navn:

Telefonnummar





**Eitt trygt grundarlag**

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkaraarbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

NORÐOYA SPARIKASSI



www.ns.fo

Netbankin
sum app
skanna kotuna

Ert tú lesandi í Føroyum ella uttanlands, er lætt at avgreiða fíggjarligu viðurskifti tíni í Norðoya Sparikassa.

Bílegg eitt ungdómsprát á tel. 47 5000

UNG 13-25 NemKonta Netbankin Gjaldkort Ráðgeving

SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum skatti
Afturrindan av mvg
Eftirlønum

sansir.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar

Linde Gas AGA

FØROYA GASSØLA

Ídnaðar- og propangass
Skeriútgerð
Sveisiútgerð
Hitaovnar
Gassútgerð
Stórkøksútgerð
Køligass

**Opnigstíðir:**
Mána. - Fríggjadag
8:00 – 17:00
Tlf. 315544
e-mail: gassola@gassola.fo

**www.gassola.fo**

# Nýtt á ÍF liðnum

NÝGGJUR LIÐSKIPARI:
Jan Ó. Ellingsgaard
Aldur: 25 ár
Pláss: Verja
Einans umboðað ÍF
Dystir í Effodeildini: 168
Mál í Effodeildini: 12



NÝGGJUR VARALIÐSKIPARI:
Karl A. Løkin
Aldur: 24 ár
Pláss: Miðvøllur
Feløg í Føroyum: NSÍ og ÍF
Dystir í Effodeildini: 129
Mál í Effodeildini: 9



NÝGGIR Í HÓPINUM:

Alex José dos Santos
Aldur: 34 ár
Pláss: Verja
Feløg í Føroyum: B36, EB/Streymur, HB og ÍF
Dystir í Effodeildini: 283
Mál í Effodeildini: 30



Oliver Nickolaj Djuraas Korch
Aldur: 21 ár
Pláss: Málverji
Spælir fyri fyrstu ferð í Føroyum
Dystir í Effodeildini: 1
Mál í Effodeildini: 0



Gunnar Christiansen
Aldur: 23 ár
Pláss: Verja
Feløg í Føroyum: KÍ og ÍF
Dystir í Effodeildini: 40
Mál í Effo deildini: 0



Hanus Eliasen:
Aldur: 31 ár
Pláss: Álop
Feløg í Føroyum: EB/Streymur, Skála og ÍF
Dystir í Effodeildini: 133
Mál í Effodeildini: 17



# Tips 13

Tips 13 er kapping, har ein leikari og ein fjeppari fáa 13 fótbóltsspurningar, og hava tey/teir 3 valmøguleikar pr. svar. Hvør spurningur gevur 1 stig. Spælt verður eftir "vinnarin situr"-leistinum. Ein leikari luttekur hvørja ferð, og spælir hann í móti einum, ið á ein ella annan hátt, hevur okkurt við ÍF at gera. Verður svarað skeivt uppá spurningar, sum beinleiðis hava við ÍF at gera, telur tað hálvt minusstig. Endar tað við javnleiki, verður eykaspurningur gjørdur, ið hevur eitt talvirði. Vinnarin er so viðkomandi, ið gitir nærmast rætta svarinum.

Fyrstur av leikarunum er higartil einasti málskjútti í ár, Bogi Reinert Petersen. At dystast í móti honum hava vit spurt fyrrverandi leikaran, ið man verða tann leikarin, ið hevur spælt flest dystir í trekk fyri ÍF uttan at tapa. Talan er um stríðsmannin Hera Hansen Nesá, ið nú er búsitandi í Danmark. Heri og Bogi valdu at seta ein sodavatnskassa við gyltum proppum uppá spæl, og endaði tað við 8-6 sigri til Hera, sum kemur at halda fram í næstu leikskrá móti einum av leikarunum.
Um tú vilt vita tey røttu svarini, so standa tey niðast á hesi síðuni.

| Nr. | Spurningur | 1 | X | 2 | BRP | HHN |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Hvør av hesum venjarunum hevur ongantíð spælt við einum enskum felagi? | Sinisa Mihajlovic | Roberto Mancini | Vincenzo Montella | 0 | 1 |
| 2 | Hvussu verður Premier League felagið Bournemouth eisini kallað? | The Berries | The Heroes | The Cherries | 1 | 1 |
| 3 | Hvør er venjari hjá Brøndby | Thomas Frank | Auri Skarbalius | Kim Vilfort | 1 | 1 |
| 4 | Hvørji feløg hevur Sonni L. Petersen umboðað í føroyskum fótbólti? | NSÍ, GÍ og Skála | NSÍ, B68 og EB/Streym | NSÍ og EB/ Streym | 0 | 1 |
| 5 | Hvat felag hevur fingið flest kort í ensku Premier League? | Watford | West Bromwich | Aston Villa | 1 | 0 |
| 6 | Hvussu nógvar landsdystir spældi Gianfranco Zola fyri Italia? | 25 | 35 | 45 | 0 | 1 |
| 7 | 9. september 2009 vann føroyska A-landsliðið 2-1 móti Litava. Hvørjir skoraðu føroysku málini? | Súni Olsen og Arnbjørn Hansen | Jóan Símun | Fróði | 1 | 1 |
| 8 | Hvør av hesum hevur spælt fægst landslystir fyri Noreg? | Erik Mykland | Tore Andre Flo | Ole Gunnar Solskjær | 1 | 1 |
| 9 | Hvør var toppskjútti hjá ÍF í 2007? | Atli Petersen | Nenad Saric | Bartal Eliasen | -0.5 | -0.5 |
| 10 | Hvør var toppskjútti í EM96? | Hristo Stoichkov | Jürgen Klinsmann | Alan Shearer | 0 | 0 |
| 11 | Hvussu nógv mál hevur Ari Ó. Ellingsgaard skotið í fremstu deildini? | 12 | 15 | 18 | -0.5 | -0.5 |
| 12 | Hvør skeyt málið hjá Liverpool í Champions League finaluni í 2007 | Xabi Alonso | Dirk Kuyt | Peter Crouch | 1 | 1 |
| 13 | Hvør dómari dømdi ÍF oftast í Effodeildini 2015? | Alex Troleis | Petur Reinert | Eiler Rasmussen | 1 | 1 |
| | Tilsamans | | | | 6 | 8 |

Rætt svar: 1 – 2 – X – 2 – 1 – X – 1 – 2 – X – 2 – 1 – X – 1




**Fuglafjarðar kommuna hevur eina sera livandi heimasíðu. Har er m.a.**

- Svartatalva
- Barnaverndin
- Brandstøðin
- Fuglafjarðar skúli
- Barnaansing
- Eldrarøkt
- Kunningarstovan
- Ruskøkið
- Leið 410
- Frítíðarskúlin
- Læknin
- Sosiala deild

*...og nógvar aðrar tænastur*

**Fuglafjarðar kommuna**


usedbaader.biz
BAADER service
OG SMIÐJUARBEIÐI
Okkara vælútgjørda smiðja niðan fyri Bedingina í Fuglafirði megnar allar vanligar smiðjuuppgávur, stórar sum smáar.
Umframt sjálva smiðjuna hava vit stóra goymslu við rustfríum tilfari, ketum, legum, gearum, motorum o.s.fr.
Ring til okkara á 775 775, ella vitja okkara heimasíðu: www.pl.fo fyri at fáa meira at vita.
BAADER
Food Processing Machinery
fomaco
Ubro SystemPac
euskan
Tel 775 775
www.pl.fo
peturlarsen


CAPTO
TIL FLÓTITROL
RÆTTILIGA FANGANDI
CAPTO er ein nýggjur nettráður til flótitrol sum VÓNIN hevur ment.
Set teg í samband við okkum fyri at hoyra meira. Sí www.vonin.com
VÓNIN


Vit gera
– vegir
– gongubreytir
– tún
– parkeringsøkir o.a.
Vit planera og fresa eisini
www.hj.fo
HJ ASFALT SP/F
Postsmoga 28 | FO-700 Klaksvík | Faroe Islands | Tel. 458800 | Fax 458801
Heri Jacobsen | Fartel. 227910 | Jóhannes Rasmussen | Fartel. 220179


Kloakk og vatn · hiti og sanitet · alt til baðirúmið
SK
SVENDKROSSTEIN
Pf. Svend Krosstein • Falkavegur 6 • Postboks 3229 • FO-110 Tórshavn
Tel. +298 344 600 • Fax +298 344 601 • www.krosstein.fo • krosstein@krosstein.fo

## ÍF'arin



| | |
|---|---|
| Navn: | Alex José dos Santos |
| Føðingardagur: | 28. mars 1981 |
| Føðistað: | Itabuna, Brasil |
| Starv: | Thomas Dam Ítróttur |
| Pláss á vøllinum: | vinstri bakkur |
| Yvirtrúgv: | |
| 3 orð sum lýsa teg: | Glaður, Seriøsur, Positivur |
| Torførasti mótstøðumaður: | Torførasti mótstøðumaður eg havi spælt ímótur er Anelka tá vit spældu móti Fenerbahce 2006.. vil siga ongan kjans!! |
| Frítíðarítriv: | Spæla guitar, trummir |
| Vónir fyri 2016/17: | Enda topp 4 |

## Tín Ítrótt:

Fyrsti dystur á 1.liðið: B36 2004
Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF: Fyrsti dysturin var 5 mars 2016 móti B36.. Úrslit verður ikki nevnt
Aðrar ítróttargreinar: Ongar
Minningarríkasti dystur: Dystur móti Víkingi í 2015 har vit vunnu 2-1 og eg skoraði til 2-1 við saksaspark
Størstu fótbóltsliga ávirkan: Roberto Carlos
Besti fótbóltsleikari: Ronaldinho, Gerrard
Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt: Einki annað
Hvat slag av venjing dámar tær best: Teknisk Venjing
Hvat slag av venjing dámar tær ikki: Fysisk Venjing

## Tínir favorittar:

Tínir favorittar:
Matur og drekka: Fleskasteik, Vatn
Slag av tónleiki: Reggie
Sjónvarpssending: Fresh Prince of Bel air
At slappa av: Hyggi eftir tegnifilm saman við dóttrunum
Troyggja nr.: 4
Besti fótbóltsleikari nakrantíð: Ronaldo Luís Nazário de Lima
Sjónvarp/filmstjørna: ongan
Besta bók/blað: Bíblian
Stuttligasti persónur: Will Smith
Stuttligasti í ÍF hópinum: Ari og Bogi Besti
ÍF áskoðari: Sigrid Petersen

## Leikarafakta:

- Er úr Brasilia
- Verfaðir Alex er fyrrverandi landsliðsliðskiparin Kristian Petersen
- Hevur sama nummar sum Kristian hevði
- Eigur tvær døtrar.
- Kom til Føroyar í 2004, og hevur umboðað B36, EB/Streym og HB síðan.
- Hevur ongan landsdyst spælt, men kann umboða bæði brasilska og føroyska landsliðið
- Umboðaði tó Føroyar í Futsal.
- Er skrásettur fyri tilsamans 354 dystir í fremstu og næstfremstu deildini, steypakapping, stórsteypadystum, Atlantic Cup, Champions League, Euro League og UEFA Cup.
- Hevur skotið tilsamans 34 mál.
- Hevur fingið 41 gul og 8 reyð kort.
- Sigrid, ið er systir unnustuna hjá Alex, er skrivari í nevndini hjá ÍF, spælir á felagsliðnum ÍF/Víkingur í bestu kvinnudeildini og er við í bruttohópinum á A-landsliðnum hjá kvinnum.
- Var ársins B36'ari 2005, hóast at ein ávísur Jákup Mikkelsen varð valdur til ársins leikara í Føroyum.
- Hevur spælt fótbólt í Brasilia, Kekkia og Danmark, umframt Føroyum.
- Er stórur fjeppari av føroysku jólunum, men vil halda nýggjár í heimlandinum.
- Er katolikkur.
- Elskar at vaska upp.


Álvaskot
Fysioterapi
v/Álvur Hansen
44 51 44

VØRDSLAN
WEARHOUSE
"...klæðir og skógvar til hennara hansara og børnini, nú alt undir somu lon"

S/PF AP BUSSKOYRING
– altíð til dystin fús

Ring til okkum á
Tel 23 52 50 · buss@buss.fo




sponsored
by
INTERSPORT®
Thomas Dam ítróttur


Tróndur í Gøtu
Leiðandi reiðarí
í norðurhøvum
Finnur Fríði
Jupiter
Tummas T
Saksaberg
VARÐIN
P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tlf: 610600
Faks: 441650 | vardin@vardin.fo | www.vardin.fo


pls.fo
SPORA BILIN
OG FÁ GLEÐI AV FYRIMUNUNUM
1. Minni slit av dekkunum
2. Lægri brennievnisnýtslu
3. Høgligari túrar
UPPMÁTING PR. AKSIL U/MVG 475,-
SPORING EFTIR AVTALU
RING 765 765
OG AVTALA TÍÐ
pl stórbilar®
verkstaður & søla
Tel 765 765 · www.pls.fo

VEST PACK

VEST PACK

*...meira enn pakkitilfar!*

- Arbeiðsklæðir
- Kjølsvín
- Balliplast
- Oljusperringar
- Pakkimaskinur
- og meira afturat

Høvuðsvirkisøkið hjá Vest Pack er plast- og etikett framleiðsla. Seinnu árini hevur Vest Pack eisini verið heildarveitari av pakkitilfari og tí, sum fylgir í kjalarvørrinum av tí - tvs. at veittar verða eisini vørur, sum ikki eru partur av sjálvari framleiðsluni, so sum pappeskjur, blokkumsløg, pakkimaskinur osv.

Styrkin hjá Vest Pack er millum annað fleksibilitetur, eitt nú av tí, at vit hava framleiðsluna í húsinum og ikki hinumegin víða hav. Somuleiðis kunnu vit tillaga framleiðsluna eftir føroyska marknaðinum, eitt nú hvat víðvíkur nøgdum, har vit hava eitt lægri minstamark fyri serframleiðslu enn okkara kappingarneytar uttanlands. Vest Pack er ISO 9000 góðkent - eisini framleiðslan.

FO-350 Vestmanna · Faroe Islands · Telefon +298 42 41 07 · www.vestpack.fo

Allar vanligar umvælingar
Dekksøla
Viðlíkahald

**Bilverkstaðið á Kambsdali**
**Tlf. 441111**




Ætlar tú at selja tíni hús í Fuglafirði ?

- vit hava keyparar, ið bíða

Niels Finsensgøta 37
Tórshavn | Tel 348 900
inni@inni.fo | inni.fo

INNI

**Venjarayvirlit menn/dreingir:**

| | |
|---|---|
| Effo | Jógvan Martin Olsen |
| 2DM | Jóhan Ellingsgaard |
| 3DM | Martin Hansen |
| U16D | Bogi R. Petersen og Clayton Soares |
| U14D | Torstein Joensen og Mouritz Mohr |
| U12D | Karl A. Løkin og Hjalti Lundsbjerg |
| U10D | Bogi Nón og Atli Ryggshamar |
| U10D | Henning Hansen og Petur við Gjónna |
| U8D | Ólavur Christiansen og Rúni Weihe |
| U8D | Jákup Baldvinsson og Jann F. Hansen |
| U6D/G | Bárður Mortensen og Høgni Zachariassen |
| U6D/G | Eyðolvur R. Petersen |

**Venjarayvirlit kvinnur/gentur:**

| | |
|---|---|
| 1DK | Svenn Ó. Olsen* |
| U12G | Durita Djurhuus og Bogi Nielsen |
| U10G | Knút Vesturtún og Hans Toftegaard |
| U8G | Kristina F. Obradovic og Anna Maria Toftegaard |
| U8G | Mary Klein |

*Saman við Víkingi

Eykaaðalfundurin verður á John's í morgin mánakvøldið 14. mars kl 20.00

Á skránni verður val av nevndarlimum.

Møtið fjølment.

# Frægi bóltspælarin Birgir Thomsen

Signar á Brúnni



Frægi bóltspælarin Birgir Thomsen var so brádliga tikin úr hesum heimi og alt ov ungur.

Eftir at hann sjálvur gavst við at spæla fótbólt, var hann ein av trúgvu ÍF – stuðlunum, ið møtti til hvønn einasta dyst.

Hesin dugnaligi og knái bóltspælarin verður ikki at síggja við vøllin longur, tí hann er komin í annað ljós, men vit, ið eru ítróttarhugað, saman við øðrum, hugsa um hann m.a. , tí hann hevur við sínum ríku gávum ríkað ÍF – felagið.

Hann var spælarin, ið mótstøðulið okkara høvdu ampa av, tí hann var so kvikur og skuldi ikki hava tað nógva plássið fyri at gera um seg.

Møtti fyri eini tíð síðani einum VB- ara, ið spældu, tá ið eg sjálvur spældi á ÍF – liðnum, hann helt soleiðis fyri: Tann spælari í Føroyum, ið ogur ræddust mest,táið vit spældu, tað var hin knái vongurin á ÍF – liðnum ,Birgir, ið megnaði tað mest ótrúliga á vøllinum, og ikki varð neyðugt hjá honum við nógvum plássi , og ringur var hann at "rokna út ."

Hugsaði um tað, sum vágbingurin segði mær, at tit, ið vóru okkara mótstøðulið, hava so nógv betur enn vit, gáa eftir nevnda gávuríka spælara.

Birgir var á fyrsta ÍF – liðnum í bestu deildini í 1971, og hann var millum hetjurnar, ið gjørdust føroyameistarar í 1979.
Honum eydnaðist at koma á landsliðið.
Birgir arbeiddi í mong ár á flakavirkinum – koyrdi trukk, og tað sum hansara samstarvsfelagar søgdu um hann, var, at hann dugdi væl at skipa arbeiðið og ikki var neyðugt at fara afturum aftur, har sum hann hevði verið.

Í nøkur ár róði hann út, við egnum báti - hann hevði nóg mikið at takast við.

So knappliga steðgaði alt upp hjá Birgiri – hann broyttist, heilsan var farin at bila, og var hann ikki tann sami Birgir, sum vit høvdu kent hann.

So brádliga vóru boð eftir honum – eisini her bar hann skjótt at.

ÍF fer við hesum orðum at lýsa frið yvir minnið um Birgir Thomsen.





Ítróttarfelag Fuglafjarðar – 530 Fuglafjørður – www.if.fo – if@if.fo

## Lima- og luttøkugjald

Góði ÍF'ari,

Nú fyrireikingarnar til nýtt kappingarár í fótbólti nærkast, vilja vit heita á fólk um at gjalda lima- og luttøkugjaldið. Gjaldið er ein av grundarsteinunum í fíggjarliga rakstrinum í felagnum, og ger, at vit sum felag, kunnu halda okkara skyldur yvirfyri limunum – uttan tykkum, einki ÍF.
Vit hava sett venjarar til so at siga øll lið, umframt at Torkil Hansen og Jenny á Lakjuni koma at hava yvirornaða barna- og ungdómsarbeiðið undir hond.

**Upphæddir:**

| | |
|---|---|
| Limagjald fyri børn 16 ár og yngri: | 300 kr. |
| Luttøkugjald fyri børn 16 ár og yngri: | 200 kr. |
| Tilsamans: | **500 kr.** |
| Limagjald vaksin: | 300 kr. |
| Luttøkugjald vaksin: | 550 kr. |
| Tilsamans: | **850 kr.** |
| Hvílandi limir/heilsufótbóltur: | **300 kr.** |

Peningurin kann flytast á eina av kontunum niðanfyri. Vinarliga viðmerkið navnið á tí, ið goldið verður fyri. Hjá íðkandi limum heita vit á, at deild eisini verður viðmerkt.

**Kontonummur:**

| | |
|---|---|
| Bank Nordik: | 6460-206.048.7 |
| Eik: | 9181-123.396.5 |
| Norðoya Sparikassi: | 9865-994.266.6 |

**ÍF takkar fyri ómakin, og vit gleða okkum til komandi kappingarár**

Salong Halda.fo
Tel. 44 23 00
Stallagøta 13
512 Norðragøta
Opið er:
Mánadag 9.00 - 17.00
Týsdag 9.00 - 19.00
Mikudag 9.00 - 19.00
Hósdag 9.00 - 18.00
Fríggjadag 9.00 - 17.00
Leygardag 9.00 - 13.00
Opið er eisini eftir avtalu
Online booking
www.salonghalda.fo



teknistovan GØTA
Jens Kl. Jacobsen
Far.: jkj 232343
jkj@teknistovan.fo
Henning Olsen
Far.: ho 232344
ho@teknistovan.fo
510 Gøta, Gøtuv. 2, Tel.: 442344 - teknistovan@teknistovan.fo - www.teknistovan.fo

### Flest kappingarár á besta liðnum hjá ÍF

| Leikari | Ár | Dystir | Mál |
|---|---|---|---|
| Ken Bærentsen | 20 | 135 | 38 |
| Bartal Eliasen | 17 | 370 | 98 |
| Torkil Hansen | 15 | 169 | 2 |
| Roy Róin | 15 | 262 | 9 |

### Toppskjúttar hjá ÍF – einans núverandi leikarar

| Leikari | Dystir | Mál | Upplegg | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| Clayton Soares do Nascimento | 79 | 31 | 13 | 44 |
| Ari Ólavsson Ellingsgaard | 80 | 14 | 24 | 38 |
| Dánjal á Lakjuni | 69 | 13 | 8 | 21 |
| Karl Abrahamson Løkin | 54 | 11 | 4 | 15 |
| Kristoffur Jakobsen | 65 | 10 | 1 | 11 |

## Hagtøl

### HETTA UMFARIÐ:

| | |
|---|---|
| 12/2/16 | Skála – B36 |
| 13/3/16 | KÍ – NSÍ |
| 13/3/16 | B68 – TB |
| 13/3/16 | HB – Víkingur |
| 13/3/16 | ÍF – AB |

### KOMANDI UMFAR:

| | |
|---|---|
| 19/3/16 | NSÍ – Skála |
| 20/3/16 | HB – KÍ |
| 20/3/16 | ÍF – Víkingur |
| 20/3/16 | TB – AB |
| 20/3/16 | B68 – B36 |

### TOPP 10 MÁLSKJÚTTAR:

| Nr Navn | Mál | Felag |
|---|---|---|
| Filip Djordjevic | 2 | Vík. |
| Jógvan A.Skeel Nolsøe | 2 | B36 |
| Andreas Lava Olsen | 1 | Vík. |
| Ari M. Olsen | 1 | HB |
| Bogi Reinert Petersen | 1 | ÍF |
| Edvin Jacobsen | 1 | Skála |
| Gestur B. Dam | 1 | B36 |
| Hákun Edmundsson | 1 | B68 |
| Heðin Klakstein | 1 | KÍ |
| Jákup V. Olsen | 1 | Vík. |

### MÁLSKJÚTTAR HJÁ ÍF:

| Navn | LK | SK | Tils. |
|---|---|---|---|
| Bogi Reinert Petersen | 1 | 0 | 1 |

### STØÐAN:

| Nr. | Lið | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Víkingur | 1 | 1 | 0 | 0 | 4 | 1 | 3 | 3 |
| 2 | B36 | 1 | 1 | 0 | 0 | 4 | 1 | 3 | 3 |
| 3 | HB | 1 | 1 | 0 | 0 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 4 | KÍ | 1 | 1 | 0 | 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 5 | B68 | 1 | 0 | 1 | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 6 | AB | 1 | 0 | 1 | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 7 | NSÍ | 1 | 0 | 0 | 1 | 1 | 2 | -1 | 0 |
| 8 | TB | 1 | 0 | 0 | 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 9 | Skála | 1 | 0 | 0 | 1 | 1 | 4 | -3 | 0 |
| 10 | ÍF | 1 | 0 | 0 | 1 | 1 | 4 | -3 | 0 |

## Liðini í dag

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Andrias Poulsen | |
| 2 | Gunnar Christiansen | |
| 3 | Poul N. Mikkelsen | |
| 4 | Alex Jose dos Santos | |
| 5 | John Daniel Guðjónsson | |
| 6 | Karl A. Løkin | |
| 7 | Dánjal á Lakjuni | |
| 8 | Bogi Reinert-Petersen | |
| 9 | Kristoffur Jakobsen | |
| 10 | Ari Ó. Ellingsgaard | |
| 13 | Hallgrím G. Hansen | (M) |
| 14 | Dánjal Pauli Højgaard | |
| 15 | Oliver Korch | (M) |
| 17 | Leivur Joensen | |
| 18 | Clayton Soares do Nascimento | |
| 23 | Andy Ó. Olsen | |
| 27 | Margeir Toftegaard | |
| 28 | Hanus Eliasen | |
| 30 | Adeshina A. Lawal | |
| 37 | Jan Ó. Ellingsgaard | (L) |
| 80 | Tóri T. Traðará | (M) |

| | |
|---|---|
| Venjari: | Jógvan Martin Olsen |
| Hjálparvenjari: | Jákup Mikkelsen |
| Liðleiðari: | Ólavur Larsen |
| Liðleiðari: | Trúgvi Nesá |

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Rói Zachariassen | (M) |
| 2 | Andri Freyr Bjørnsson | |
| 3 | Rói Danielsen | (L) |
| 4 | Gunnar Haraldsen | |
| 5 | Kári Nielsen | |
| 6 | Dimitie Jankovic | |
| 7 | Dan í Soylu | |
| 8 | Bárður Olsen | |
| 9 | Nikolaj Eriksen | |
| 10 | Símun Samuelsen | |
| 11 | Patrik Johannesen | |
| 12 | Sandri Færø | |
| 13 | Jónas Stenberg | |
| 15 | Høgni Midjord | |
| 16 | Heðin Stenberg | (M) |
| 17 | Árni G. Nielsen | |
| 18 | Martin Midjord | |
| 19 | Sørin N. Samuelsen | |
| 20 | Karstin Højgaard | |
| 23 | Rasmus Dan Sørensen | |
| 25 | Jákup Højgaard | (M) |

| | |
|---|---|
| Venjari: | Trygvi Mortensen |
| Hjálparvenjari: | Terji L. Hansen |
| Liðleiðari: | Eyðun Dalsgard |
| Liðleiðari: | Kári Skála |

Bóltstuðul er Kára Ann Petersen

Dómari: Rúni Gaardbo
Hjálpardómarar: ohnleif Gerðisá og Jan Andersen
4. dómari: Jóannes Mikkelsen
Eygleiðari: Tummas

# JOHN's

KARVATOFTIR — FUGLAFJØRÐUR

# LIVANDI TÓNLEIKUR

HVØRT VIKUSKIFTI

ALTÍÐ **PUBQUIZ**

LEYGARKVØLD KL. 22

OG VIT VÍSA SJÁLVANDI

**DYSTIRNAR**!

OPIÐ: FRÍGGJADAG 19—04 — LEYGARDAG 17—04 — SUNNUDAG 17—23

FYLG VIÐ Á FACEBOOK **/ JOHN'S Í FUGLAFIRÐI**